## DAGSINS MEINING

# Dýrt tilboð - góður journalistikkur!

Ein av ónollunum frá 80-árunum hevur tikið seg uppaftur. Nú stendur fólki aftur í boði at taka brúkslán. Seinastu árini hava peningastovnarnir sjálvandi lánt pening til nýtslu, men nú eru eisini handilshús farin at bjóða viðskiftafólkum lán at keypa fyri. Og sum ikki einaferð skipar eitt danskt fíggingarfelag fyri.

Rentan sær so tilforlátilig út, undir 2 prosent, men so er spurningurin, um tað verður nóg væl upplýst, um hetta er rentan um mánaðin ella um árið? Tí, her er tann stóri munurin, sum brúkarin, ella keyparin, eigur at vera varugur við. Ella verða gjørdur varugur við, tá hann tekur av einum slíkum tilboði.

Tíðindabrotið í Útvarpinum mikudagin var tí kærkomið. Har var skorið út í papp, hvussu nógv keyparin í grundini rindar í rentu, tá hann t.d. keypir innbúgv fyri 20.000 krónur. Um keyparin velur at gjalda í eitt 5-ára skeið, so hevur hann goldið meiri enn 35.000 krónur, tá tað kemur til stykkis!

Hetta vóru góð brúkaratíðindi, sum vit hava alt ov lítið av í Føroyum. Men hetta er tilfar, sum krevur tíð, bæði at kanna, tosa við fólk, rokna út, og at enda fáa í ein snøggan búna, sum lesarin ella lurtarin kann skilja. Hasi tíðindini skilti lurtarin, men sum sagt varð, “tað er dýrt at vera fátækur”, og tað eru tíverri óivað tey, sum ikki hava annan møguleika.

Nú skal á hesum stað ikki verða sagt, um nakað verður dult ella ikki í tilboðnum frá danska fíggingarfelagnum, men vit skulu bara seta spurnartekin við, um føroyski brúkarin er nóg væl vardur, og hevur nóg góðar møguleikar at kæra, um hann kennir seg snýttan.

Svarið er nei. Vit hava hvørki brúkararáð ella brúkaraumboðsmann. Heldur ikki gera fjølmiðlar nóg mikið við hetta evnið - vit skulu taka í egnan barm. Tí er ætlanin hjá Javnaðarlokkinum at koma við uppskoti um ein brúkaraumboðsmann kærkomin. So er spurningurin, um tað fæst undirtøka fyri hesum í Løgtinginum. Tað tók nógv ár at fáa Løgtingsins Umboðsmann, hóast hetta skuldi verið ein týðandi partur í einum nútímans fólkaræði - at verja borgaran.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Brókaleysur journalistur »i kongens tjeneste i kejserens nye klæder«

**Annfinnur Heinesen Jacobsen**

Eg ætlaði veruliga ikki at gera nakra viðmerking til tað sokallaða »ummælið« av Free-Føroyar tiltakinum, sum Rúnar Reistrup skrivaði í týsdags-Sosialinum. Men av tí at vandi er fyri, at fólk fara at trúgva hasum tvætlinum, so meti eg tað ov týdningarmikið, at lata tað fara óviðmerkt aftur við borðinum.

Harra Reistrup sigur millum annað: »at fullveldisargumentini skuldu verða lættari svølgilig« Og at »UT styggir fólk burtur«.

Vit (UT) høvdu frammanundan lýst við agitatión, propaganda, ungdómsuppøsing, o. s. fr. so annað kann ikki sigast, enn at fólk vistu, hvat tey fingu. Har var einki ballað inn. Einki uttanumtos. Rúnar skilti kanska ikki merkingina av hesum orðunum, men hann skolaði í ríkiligt mát argumentini niður, so heilt »ósvølgilig« kundu tey ikki verða. Stóra fólkamongdin í Sandagerði leygarkvøldið bar ikki júst boð um, at fólk vórðu stygd burtur. Tað talar fyri seg sjálvt.

Víðari sigur hann, at okkara »rabiata orðaskvaldur fornermaði tær smáu gráu á ovastu hædd«.

Hann mátti ikki ditta sær at sagt nakað neiligt um tiltakið, tí sjálvur stuttleikaði hann sær óført!

Síðst eg sá hann, var harra Reistrup so blástur á ovastu rók, at hann var í holt við at útfylla eitt innlimingarskjal til Unga Tjóðveldi! So staðfestast má, at propagandain virkaði til fulnar. Nú verður spennandi, um hann fær eitt limabræv við postinum ein av døgunum. Hann skal verða so hjartaliga vælkomin!

Ummælið ber brá av at verða skrivað frammanundan, og ummælarin hevði uttan iva frammanundan avgjørt at fáa ilt í dintilin. Allarhelst umbiðið arbeiði frá ritstjórnini á Sosialinum. Tað var ikki meir enn væntað.

At enda vil eg líka skoyta uppí, at eg fleiri ferðir hetta góða leygarkvøld tosaði við Rúnar; eg spurdi eisini um hansara meining um tiltakið. Jújú, hann læt bara væl at, og tí helt eg tað eisini verða so løgið við hesum misnøgda ummælinum.

Hinvegin, so forpliktar tað at arbeiða á Sosialinum.

Tí átti eg kanska ikki at lagt eftir harra Reistrup, men hann setti navn sítt undir, so tað má standa fyri hansara egnu rokning!

Við Tjóðveldiskvøðu.

# Viðmerking til Annfinn

**Rúnar Reistrup,**
*blaðmaður á Sosialinum*

Til omanfyri standandi bræv hjá Annfinni Jacobsen skal viðmerkjast, at umrødda ummæli sjálvsagt ikki var skrivað frammanundan tiltakinum, og at eg, í mun til ávís onnur, ikki renni ørindir fyri hvørki ritstjórnir ella politiskar flokkar.

# Allir tagdu innaveggja eingin orðið feldi

**Palli Dalsgaard**

Vit hava upplivað ikki sørt av lønarstríði seinastu tíðina. Eitt nýtt skip lá í fimm mánaðir vegna lønarósemju, síðan streikan, sum eisini vardi leingi, og nú aftur eitt nýtt skip, sum tað tók tríggjar mánaðir til at blíva samdir um lønina. Lønarhækkingin, yvirmenninir á báðum skipunum kravdu, hoyrdi undir fíggjarmálaráðharran, hann var ikki at rokka, tá talan var um lønarbata. Tað fáa teir ikki frá mær, segði hann í sjónvarpinum. Men vit sóu ein annan lønarbata í sjónvarpinum fyri stuttum, tað var ikki eiti á upphædd, har skuldi leggjast oman á eina nokk so hampuliga løn. Tað, hyggjararnir løgdu merki til var, at fíggjarmálaráðharrin var at síggja á myndini, eins og fleiri onnur, men hann mótmælti ikki. Tað var sum í Leivskvæði, allir tagdu innanveggja eingin orðið førdi.

Sosialurin
Lesið Sosialin - tað loysir seg

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo

Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.



## VIÐMERKINGAR

# Vestegnens Zoneterapeutskole

**Sven J. Holst**
**Lilian Holst**

I anledning af den megen diskussion på Færøerne angående uddannelsen til zoneterapeut, vil vi gerne kommentere dette:

Vi har modtaget oversættelse til dansk (da vi desværre ikke kan færøsk) af en radioudsendelse, hvor en journalist ved navn O. J. Rólantsson og en zoneterapeut ved navn Oda Andreasen udtaler sig om vores skole og vores uddannelse af zoneterapeuter.

Vi er ganske forundret over, at denne journalist Rólantsson udspørger en tilfældig zoneterapeut om vores skole. Hvorfor udfører han ikke seriøs research? Vi har hele tiden været at træffe på telefonen her i Danmark, og jeg ved, at alle færinger kan dansk, så vi kunne så let som ingenting have givet denne Rólantsson alle relevante oplysninger om uddannelsen på vores skole.

Vesegnens Zoneterapeutskole har uddannet zoneterapeuter i 15 år i Danmark, Norge og nu også på Færøerne. Vores uddannelse er meget anerkendt og vi har uddannet mange dygtige zoneterapeuter. Som også vores lærer og repræsentant på Færøerne, Øivind Solbakk, har udtalt i avisen i lørdags, er vores uddannelse godkendt af SAB (Sammenslutningen af alternative behandlere), NFS (Norsk forening for soneterapeuter) og NNH (Norske naturterapeuters hovedorganisation).

Det undrer os derfor utrolig meget, at en helt tilfældig zoneterapeut, som åbenbart lider af brødnid, fordi der nu er kommet flere zoneterapeuter på Færøerne til at hjælpe færingerne af med deres plager, bliver rådført om noget, hun aldeles ikke har kendskab til.

Denne Oda Andreasen er ved en fejltagelse blevet inviteret med til et møde i Bergen. Zoneterapeuten, som leder disse møder, og som iøvrigt er uddannet på Vestegnens Zoneterapeutskole, Lillan Heinrichs, for 15 år siden, troede, at Oda Andreasen var medlem af FDZ. Derfor blev hun inviteret med. Lillan Heinrichs vidste ikke, at hun slet ikke er medlem! Oda Andreasen abonnerer kun på FDZ' blad. Det kan enhver bager og grønthandler gøre! Jeg har kontaktet FDZ' formand, som skriftlig har bekræftet dette.

Vi synes, det er helt forfærdeligt, at den færøske radio, Kanal Rás 2, kan sende ud i æteren, at vores uddannelse ikke er godkendt nogen steder, at den ikke er god nok, samt at eleverne får papirer på noget som ikke er godt nok. Endvidere, at uddannelsen ikke opfylder de krav Told og Skat stiller for momsfritagelse! Hvad er det dog for en form for journalistik??? Den ene usandhed efter den anden ryger ud af munden på både journalisten og Oda Andreasen. Ifølge injurielovgivningen er det strafbart at tilsvine andres erhverv med sådanne usande påstande!

Zoneterapeutuddannelsen på vores skole består af ialt 660 timer, fordelt på 300 timers anatomi/fysiologi/patologi og på 360 timers praktik. Vi står inde for, at alle zoneterapeuter, som er uddannet og eksamineret på Færøerne er dygtige og kan deres job, og man kan roligt lade sig behandle af dem. Vi har besøgt Færøerne 4 gange og konstateret, at alt var ok.

Øivind Solbakk bruger nøjagtig samme undervisningsmateriale, som skolen bruger i Norge, hvor vi har mange elever, og som vi har brugt i Danmark. Med til mødet i Bergen var iøvrigt 5 zoneterapeuter, som er uddannet her ved skolen, samt som nævnt ovenfor Lillan Heinrichs, som er koordinator for det nordiske samarbejde. På denne baggrund virker det jo helt sygt, at Oda Andreasen udtaler, at det er synd for de folk, som er uddannet ved vores skole!

Kan vi ikke snart blive fri for at høre mere fra denne Oda Andreasen. Vi er meget trætte af hendes mange usandheder. Endvidere tror jeg også, at FDZ er træt af, at hun reklamerer med at være medlem både det ene og andet sted, når hun ikke er det, men det vil FDZ's etiske råd sikkert tage sig af, og jeg håber Pressenævnet vil tage sig af journalist Rólantsson's useriøse radioudsendelse.

Sluttelig kan vi gøre opmærksom på, at zoneterapeutuddannelsen for 20 år siden, hvor Oda Andreasen lærte det, højst var på 50 timer!!!

# Demokrati í Føroyum ella føroyskt demokrati

**Súsanna Dam**



Ikki um eg fati, hví málið um tær sera ríkt máldu pensiónirnar til gamlar landsstýrismenn vekur slíkan ans. Hetta er bara dømi um (grótføroyskt) demokrati, tá tað virkar allarbest. Vit hava fingið teir politikkarar, vit hava valt, og teir gera av hvussu stjórnað verður. Meirlutin av fólkinum valdi politikkarar til at loysa okkum úr donskum hafti, og tað er tað, teir gera. Tá blokkurin verður burtur, verður lítið og einki til fólkapensiónir og eldrarøkt, so tað er tá sólarklárt, at teir mugu hugsa um seg og sín aldurdóm, hvør vildi ikki gjørt tað sama. Teir vita sjálvir allarbest, at púrt einki høpi er í procentrokningin hjá Høgna Hoydal, og taka síni fyrilit. Tað hevði eg eisini gjørt, fekk eg møguleikan. Vit hava givið teimum einkarrætt til at nýta okkara skattakrónur sum best, og sanniliga um teir ikki royna eftir førimuni. Harafturat siga teir flestu seg púra ósekan í øllum illgitingunum, tí tíðin var ov stutt, summarfrítíðin fyri stavn, og bráðskundur á atkvøðugreiðslum. Og neyðars fíggjarmálaráðharrin visti av ongum, var burturstaddur, tá aðrir lumpaðu lokið av landskassanum. Hetta var bara tingsins demokratiski vilji, sjálvvirkandi og ótilvitað sum altíð. Meirlutin av veljarafjøldini hevur við síni atkvøðu longu sagt frá, at okkum tørvar hvørki skúlar, sjúkrahús ella ellisheim, um bara fullveldið vinnur frama. Mær er sagt, at alt verður øðrvísi tá. Eingin - uttan politikkarar - fara at krevja so nógv, sum í dag, Sambært vælsnikkaðu útsagnum løg og varaløg skal samfelagið skerast eftir heimagjørdum føroyskum mátistokki, hóskandi til okkara rótføroysku mentan, so romantiskt at bara hugflogið setir mørk. Hóast vit ikki enn hava sæð minsta vet av nakrari nýskipan, uttan hesar rættiliga munadyggu lønarbatarnar til politikararnar, sum mótvekt móti "smærri" avmarkingum á teimum týdningarmiklu økjunum, hepnast teimum enn at varðveita myndina av frælsisstríði móti donskum trælahaldi.. Ein av mínum starvsfeløgunum í gomlum bankadøgum plagdi at taka soleiðis til "Tyve og røvere skal ikki arve Guds rige, kun ærlige folk, som stjæler". Hetta varð sagt, tá vit sóu vaksnar menn tíggja sær sum gnisandi skúlagentur, tá tátíðarinnar politikkarar høvdu lagt eina nýggja avskrivingarreglu afturat skattacirkusinum ella høvdu kreera onkra snilda stuðulslóg. Vónandi fer eingin at hugsa um slík orðafelli í sambandi við landstýrismannapensiónirnar, men tíbetur restar lítið í, áðrenn núverandi politikkarar hava prógvað, at teir eru á leið á sama siðalagsstøði.

Jón Kristjansson, fiskifrøðingur:

# Broytið ikki fiskidagarnar



*Jón Kristijansson íslendskur fiskifrøðingur mælir til at halda fram við verandi fiskdøgum og hann heldur ikki at nøkur orsøk er at óttast økt veiðutrýst, tí flotin er vorðin effektivari*

**FISKIDAGAR**
*Jústinus Leivsson Eidesgaard*

Íslendski fiskifrøðingurin Jón Kristjansson, sum Jørgen Niclasen hevur biðið um at geva eina óhefta meting, um tað er rætt at minka um fiskidagarnar, hevur gjørt sítt tilmæli til Jørgen Niclasen.

- Eg dugi ikki at síggja nakra orsøk til at broyta fiskidagatalið í komandi ári. Teir háttir sum nú verða brúktir til at meta um stovnarnir duga ikki, um tú skal hava eina meting av hvussu stovnurin hevur tað akkurát nú. Teir kunnu brúkast til at skriva søgu og hvussu gongdin hevur verið, uttan tó at teir eru akkurátir. Verandi útrokningarháttirnir kunnu skráseta samlaðu deyðiligheitina hjá fiskastovnunum, men geva eina skeiva mynd av veiðutrýstinum, tí fiskadeyðin er støðugur í einum umhvørvi har umstøðurnar annars eru óstøðugar og skiftandi, sigur Jón Kristijansson í niðurstøðuni

-Fiskidagaskipanin er bygd á eftirlit av avleiðingum og er tí væl egnað til at fáa meira burturúr tá nógvur fiskur er til. Tá stovnarnir eru væl fyri og hetta yvirskot kann ikki gangnýtast undir eini vanligari kvotuskipan. Harumframt minkar fiskidagaskipanin um útblaking og forðar fyri fiskiskapi, har skilt verður á dekkinum, soleiðis at bara tann dýrasti fiskurin verður førdur til lands. Tað er lítið sannlíkt, at veiðutrýstið gerst ov stórt í einum fiskiskapi ið byggir so nógv á snellu og línuveiðu, sigur Jon Kristijansson.

- Eg haldi heldur ikki, at okkum tørvar at taka atlit fyri eini øking í veiðutrýstinum, tí flotin er vorðin effektivari, sigur Jón Kristijansson.

Fiskirannsóknarstovan mælið til at skerja fiskidagatalið við 25 prosentum yvir trý ár. Ein meiriluti í fiskidaganevndini mælir til at lata fiskidagatalið verða óbroytt í komandi fiskidagaárið.